

# gin í Tinganesi

*Kjakið um javnstøða sær út til at hava givið eitt ítøkiligt úrslit í føroyskum politikki. Frá einum reinum »taleban-landsstýri« við monnum, sum løgmaður sjálvur hevur málborið seg, eru nú tríggjar kvinnur í Tinganesi. Frá vinstru Karsten Hansen, fíggjarmál, Miðflokkurin, Tórbjørn Jacobsen, fiskivinnu- og tilfeingismál, Tjóðveldi, Kristina Háfoss, mentamál, Tjóðveldi, Høgni Hoydal, uttanríkismál, Tjóðveldi, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Javnaðarflokkurin, Helena Dam á Neystabø, lógarmál, Javnaðarflokkurin, Bjørt Samuelsen, vinnumál, Tjóðveldi og Hans Pauli Strøm, almanna- og heilsumál, Javnaðarflokkurin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kristina Háfoss, mentamál**
**Fødd:** 26. juni 1975
**Foreldur:** Ana Helena og John P. Danielsen
**Hjúnarfelagi:** Ronnie Háfoss
**Børn:** Hildur (2001), Hákun (2004) og Erlendur (2006)
**Útbúgving:** BA í búskapi, BA í løgfrøði, cand.jur., cand.polit.
**Yrki:** Umsitingin hjá donsku stjórnini, deildarleiðari á Tryggingarfelagnum Føroyar
**Politisk lívsleið:** Vald á ting 2002-2004. Hevur ikki verið virkin í politikki seinastu fýra árini.
**Málsøki:** Mentanarmál

**Karsten Hansen, fíggjarmál**
**Føddur:** 18. august 1944
**Foreldur:** Andrea og Frederik Hansen
**Hjúnarfelagi:** Gull-Britt, f. Hinge
**Børn:** Heidi, Thorbjørn, Frederik, Mirjam
**Útbúgving:** Løgreglumaður
**Yrki:** Sjómaður 1959-62, handilsstarv 1963-66, løgreglumaður 1966-98, støðleiðari 1975-85, sýslumaður 1985-98
**Politisk lívsleið:** Landsstýrismaður 1998-2004. Valdur á ting 2004. Afturvaldur við valið 2008.
**Málsøki:** Fíggjarmál
*Hevur fyrr umboðað Tjóðveldisflokkin í landsstýrinum*




**Marine Harvest** er størsta alifelag í heiminum, og verður triði hvør aldur laksur framleiddur í einum Marine Harvest felag. Í Føroyum rekur Marine Harvest 4 alibrúk og eina smoltstøð, og framleiða vit 6.000 tons av laksi um árið.

## ALARI
## til Marine Harvest Faroes P/F

Søkt verður eftir alara/røktara til alingina hjá Marine Harvest Faroes á Veðranesi.

**Arbeiði fevnir um:**
- at gera aliøkið klárt til várútsetingina 2008
- fóðring og røkt av fiski
- dagligt viðlíkahald av útgerð

Roknast má við kvøldar- og vikuskiftisvaktum. Løn sambært avtalu.

Áhugað kunna tosa við rakstrarleiðaran á Veðranesi, Finnur Johannesen, á telefon 777075.

Umsóknarfreistin er 15. februar 2008

Marine Harvest Faroes P/F
Ternubrekkan 1
695 Hellurnar

www.marineharvest.com

marineharvest
excellence in seafood